## Bara teir nýggju fyri KÍ

Síðan summarsteðgin hava bara nýggir menn gjørt mál fyri KÍ. Í dystinum ímóti B68 vóru tað Todi Jónsson og Páll Klettskarð, ið gjørdu málini, og í gjár vóru tað Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør og Páll Klettskarð málini í 1-3 sigrinum ímóti 07Vestur í Sørvági. Hetta kundi bent á, at KÍ við sínum higartil seks nýggju leikarum hevur ein stóran møguleika at gera mál í øllum dystum.



## Kongafelagið kom í neyð av arabarum

Í gjár megnaði Real Madrid ikki at vinna á Al-Ittihad úr Saudi Arabia. Dysturin endaði 1-1. Raul legði tíðliga í dystinum Real á odda. Men liðið við størstu keypunum í heiminum í summar megnaði ikki at halda málið reint, tá Hecham Aboucherouane javnaði tá ein góður tími var spældur. Dysturin varð spældur á Santiago Bernabeu, og heimsins dýrasti leikari, Cristiano Ronaldo, slapp á vøllin eina løtu, men lítið kom burturúr hjá honum. Tí kann metast, at kongafelagið enn ikki er komið heilt upp í gear.

NSÍ-B36 3-0 (0-0):

# Eingir eftirverkir

NSÍ

B36

**Ófriðarliga vikan, ið fór, sá ikki út til at nerva NSÍ stórvegis, tá liðið í gjár við Løkin tók ímóti B36. Christian Høgni Jacobsen vísti gomlu taktirnar við tveimum málum í einum dysti, ið av røttum átti at havt nógv fleiri mál, tí kjansirnir trutu ikki**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Bæði NSÍ og B36 vóru før fyri at levera gott undirhald í fyrra hálvleiki við Løkin í gjár. Tað var kanska B36, ið hevði betri stýr á spælinum á miðvøllinum, men NSÍ megnaði væl at spæla seg fram við sínum egnu trupulleikum og brúkti so síðurnar í staðin, til miðvøllurin í seinna hálvleiki hevði funnið stevið.

Talan var um nógvar málkjansir, harav NSÍ átti teir flestu, so tí var tað heilt løgið, at støðan framvegis var 0-0, tá dómarin bríksladi fyri hálvleiksteðginum. Hetta sá lovandi út, og í steðginum vóru viðhaldsfólkini hjá báðum liðum spent til seinna hálvleik, tá alt kundi henda.

Hjá heimaliðnum var Károly Potemkin einar tvær ella tríggjar ferðir í góðum støðum, har hann nokk eisini gjørdi tað rætta, men bara ikki kundi leggja upp fyri verjuspælinum hjá B36, ið dugdi væl at hava rætta fótin á rætta stað, tá mest ráddi um at binda fyri. Eisini Bogi Løkin og Jóhan Troest høvdu sínar stóru møguleikar við høvdinum, men sendu beint uppum.

Í hinum endanum hevði Magnus Olsen nógv tann størsta kjansin, tá hann bleiv spældur leysur innan fyri verjuna hjá NSÍ, men vælspælandi Meinhardt Joensen vísti síni bestu kynstur og fekk blokerað, so einki spurdist burturúr.

### NSÍ yvirtók

Eftir steðgin fekk tað stóran týdning fyri dystin víðari, at NSÍ mestsum beinanvegin kom á odda 1-0. Hetta málið fekk Christian Høgni Jacobsen, tá Bogi Løkin hegnisliga spældi hann leysan og Christian Høgni í sínum eyðkenda stíli fekk lokkað B36-málverjan niður, áðrenn hann rundaði hann og sendi bóltin í tóma málið.

Málið var týðiliga ein stórur lætti hjá heimamonnunum, sum nú fóru at spæla við nógv størri sjálvsáliti, samstundi sum teir yvirtóku miðvøllin og tískil gjørdu tað meira enn trupult hjá B36 at skapa tað stóra frameftir. Tó hevði B36 einar tveir rímiliga stórar møguleikar, men fekk bara einki burtur úr teimum.

Sum dystinum leið, royndi B36 at koma longur fram á vøllin, og tað gjørdi tað bara uppaftur meira opið hjá NSÍ, ið dúgliga sókti at og skapti nógv meira enn havnarfelagið, ið sær út til at hava stórar trupulleikar við at hava veruligan brodd har frammi. Tað sæst eisini aftur á stigatalvuni, har B36 telist millum minst skorandi liðini í Vodafonedeildini.

### Uppiborin sigur

Dysturin livdi tó framvegis, tí har var bara tað eina málið komið. Men ímóti endanum eydnaðist NSÍ at skora tvær ferðir aftrat og avgera dystin. Fyrst var tað Jann Ingi Petersen, ið smekkaði flatt í málið úr 12 metrum, eftir at Bogi Løkin hevði sent honum bóltin inni í B36-brotsteiginum, og síðani var tað Jann Martin Mortensen, ið einfalt spældi Christian Høgna leysan í síðsta minuttinum, so hann trygt kundi skora til 3-0.

Í yvirtíðini hevði NSÍ enntá ein dupultmøguleika aftrat, tá fyrst innskifti Klæmint Olsen sendi hart á stongina og bólturin stakk útaftur til Christian Høgna, ið tóktist eitt sindur skakkur av tóma málinum framman fyri sær og sendi við síðuna av.

Sostatt sá ikki út til, at ófriðarliga vikan, ið fór, ikki sá út til at hava nervað NSÍ stórvegis. Spælið hjá heimaliðnum var gott og miðvíst, og hóast B36 var so mikið við, at tey trý málini á muni kundu tykjast í so nógv, var talan um eitt gott avrik hjá NSÍ, ið til fulnar rættvísgjørdi sigurin.

Tey trý stigini gjørdu eisini sítt til, at NSÍ er við í stuttligara endanum, meðan B36 ikki er meira enn ein dyst frá at liggja niðan fyri ta keðiligu strikuna á stigatalvuni.




**Í málleysa fyrra hálvleikinum millum NSÍ og B36 vóru tó nógvir málmøguleikar, og millum annað leikaði fleiri ferðir hart á eftir deyðbóltsstøður framman fyri málið hjá B36**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Gott fyri sjálválitið

– Tað var ein góð kensla at fáa mál, nú eg ikki havi spælt so nógv síðsta hálva árið. Og so at fáa tvey mál, hjálpir eisini upp á sjálvsálitið, segði NSÍ-framherjin, Christian Høgni Jacobsen, eftir heimasigurin á B36.

– Hetta var annars ein dystur, ið var rættiliga javnur í fyrra hálvleiki, tá B36 spældi væl og kom til onkrar kjansir, umframt at vit eisini fingu fleiri stórar. Men í seinna hálvleiki skaptu vit nógv meiri kjansir enn teir, og spælið gekk rímiliga væl hjá okkum.

Christian Høgni viðgekk, at málið um Hjalgrím Elttør, sum er farin frá NSÍ til KÍ, sjálvandi hevði fylt nógv síðstu dagarnar, men at tað tó ikki ávirkaði liðið, tá samanumkom:

– Sovorðið órógvar altíð eitt sindur, men vit hava roynt at fokuserað upp á henda dystin, og tað eydnaðist fult út, staðfesti tvífaldi málskjúttin.

*hil*

## Munurin var ikki trý mál

– Hetta var ein javnur dystur í fyrra hálvleiki, har vit høvdu teir 100 prosents kjansir. Men í seinna hálvleiki spæla vit bóltin fyri føturnar á teimum og fáa mál ímóti okkum, segði B36-venjarin, Mikkjal Thomasen.

– Í seinna hálvleiki høvdu vit eisini tveir 100 prosent møguleikar, og tá vit ikki fáa mál, verður torført hjá okkum at vinna. At tað so gjørdist 3-0, var ikki akkurát munurin, men soleiðis bleiv tað bara. Men at tað er torført at spæla í Runavík, vita vit.

Venjarin er ikki so øgiliga upptikin av, hvussu úrslitini hátta seg her og nú, men hevur betri hug at hyggja frameftir:

– Eg havi sum uppgávu at gera liðið klárt til næsta ár, og ta uppgávuna taki eg í størsta álvara, segði Mikkjal Thomasen, ið tó ikki vildi siga, at tað eisini verður hann, sum stendur við róðrið næsta ár.

*hil*